DAGSINS MEINING

Ungdómur og tónleikur

Tey seinastu árini hevur føroyskur tónleikur verið í sterkari menning og er hetta galdandi fyri bæði klassiskan eins væl og fyri rútmiskan tónleik. Tað er ikki bert í Havn at vit hava eitt ríkt tónaleikalív, men hetta merkist um alt landið. Ja kanska eru tað økini uttan fyri høvuðsstaðin, sum gera mest vart við seg. Prix Føroyar er í gongd við fullari ferð. Mentanarhúsið í Fuglafirði er framúr góður karmur um hetta stórfingna tiltak. Tað er sera gott, at vit hava fingið eitt hús sum mentanarhúsið í Fuglafirði, soleiðis, at tað ber til at hava stór tiltøk uttan fyri Havnina. Vónandi verður hesum húsi lív lagað, tí húsið hevur longu prógvað sín stóra týdning ikki bert fyri mentanarlívið í Eysturoy men fyri alt landið.

Sum nevnt er føroyskur tónleikur í sterkari menning. Hetta er eitt øki, sum landsins myndugleikar eiga at stuðla. Hetta eigur at verða gjørt bæði av mentanarligum og av búskaparligum orsøkum. Tað er sjálvsagt, at myndugleikarnir eiga at stuðla tónleikinum. Ein týðandi orsøk til menningina er at finna í musikkskúlunum, har ung talent kunnu mennast og blóma. Hesi gávuríku fólk leggja sína listarligu orku í rútmiskar bólkar ella leika í klassiskum bólkum. Báðir formar hava týdning fyri føroyska mentan og báðir formar eiga at fáa dyggan stuðul frá myndugleikunum. Hetta skapar gleði og trivnað.

Men tónlist og tónleikavirksemi eru eisini góður búskapur. Tað er einki at ivast í, at stórir útflutningsmøguleikar eru í føroyskum tónleiki. Tað ræður tí um, at tað almenna skapar góðar karmar kring tónleikavirksemið í Føroyum. Á hesum øki eru stórir menningarmøguleikar, tí her eru bæði arbeiðspláss, inntøkumøguleikar, trivnaður og økismenning alt í einum. Hartil kemur, at okkara ungu tónaskøld og tónleikarar gera eitt stórt PR-arbeiði fyri Føroyar uttanlanda. Tey ungu tónlistafólkini, klassisk so væl sum rútmisk, hava sama týdning sum eitt nú fótbóltslandsliðið. Tey gera, at Føroyar koma í gott orð uttanlanda og tað hava vit harðliga brúk fyri. Og so skapa tey góða list, og tað er tað, sum hevur største týdningin. At ung tvørakvinna stóð seg so avbera væl í stórari danskari tónleikakapping boðar eisini frá góðum og eigur at geva teimum, sum dagliga arbeiða við eitt nú tónleikaundirvísing og myndugleikum annars gott mót og er tað ein staðfesting av, hvussu stóran týdning eitt ríkt tónleikalív hevur fyri bæði okkum sjálvi og fyri Føroyar sum so. Tillukku til Prixvinnarar og luttakarar og til Guðrun. Koyrið á.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Útreiðslubýtið millum Landskassa og Statskassa

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Tað hava verið nakrar útsagnir í seinastuni, sum eg ikki meti geva fólki okkara eina rætta mynd av týdninginum, sum blokkurin hevur í tí Føroyska búskapinum. Sagt hevur verið, at nú eru vit so nær einum sjálvberandi búskapi, at blokkurin einans er uml. 6 % av tí samlaða búskapinum.

Útreiðslubyrðan millum Landskassa og Statskassa á rakstrar- og løguútreiðslum broytist, alt eftir hvussu stórar ella lítlar útreiðslurnar hjá landskassanum eru.

Vaksandi útreiðslur hjá Landskassanum, sum vit hava í løtuni, viðføra at Statskassans partur av útreiðslunum minkar (sjálvandi eisini í prosentum).

Fallandi útreiðslur hjá Landskassanum vaksa hinvegin um Statskassans part av útreiðslunum, (eisini í prosentum).

Miðskeiðis í 70-unum var útreiðslubyrðan hjá Statskassanum umleið 40 % av samlaðu rakstrar og løguútreiðslunum.

Í 1992 var hesin partur fallin til 24 %. Taka vit tíðarskeiðið frá 1993 til 1998 var útreiðslubyrðan hjá statskassanum millum 29 og 31 %.

Frá 1999 til 2001 var parturin hjá statskassanum 31 til 32 %.

Við minkingini av blokkinum er statskassans partur av samlaðu rakstrar- og løguútreiðslunum vorðin 23 %, men nú er eisini, sum øllum kunnugt, einki yvirskot hjá Landskassanum.

Taka vit Statskassa og Landskassa frá 1999 til 2002 sær soleiðis út.

	1999	2000	2001	2002
Landskassi	2.690	2.887	3.103	3.395
Statskassi	1.291	1.339	1.371	1.003
Tilsaman	3.981	4.226	4.474	4.398
Statskassin í prosentum	32 %	32 %	31 %	23 %

Mín áheitan á Tjóðveldisflokkinum skal verða, at flokkurin í framtíðini letur verða við at villeiða fólkið við at siga, at blokkurin nú einki sagt av Tjóðveldisflokkinum um hesa avbjóðing.

Nú er tíðin komin hvar gerðir skulu setast ístaðin fyri orð. Tað eru sum kunnugt einans tveir mátar at gerða hetta uppá, og tað veit hvørt mansbarn í Føroyum, tað er at lækka útreiðslurnar, og ella at hækka inntøkurnar.

Hví er nú javnvágin í Samgonguni vorðin so út av lagi vánalig? Hetta er eisini ógvuliga einfalt, og tú hoyrir tað allastaðni, hvar ein bólkur sum skuldi havt felags áhugamál skrædnar, tú hoyrir somu viðmerkingar ella undanførslur innanfyri Samgonguna í løtuni.

- Skuldi ikki havt stemma fyri Fíggarlógini.
- Útreiðslirnar skulu ikki hækka, um mítt lokala øki verður rakt.
- Teir eru óseriøsir, teir siga ikki sannleikan, teir villeiða fólk.
- Justitsmorð, hattar skal koma teimum aftur um brekku.

Mín næsta áheitan skal samstarvsflokkinum vera, at vit verða á samgonguna um beinanvegin at grava stríðsøksina og finna eitt felags stev ella at bróta samstarvið. Hetta sum nú hendir, hevur Føroya land ikki uppiborið, og so langt frá tí. Tað sama hvør kemur til valdið í Føroyum, so skulu tung tøk takast ta næstu tíðina.

Sjónleikaraskeið fyri suðuroyingar

TÍÐINDASKRIV

Vikuskiftið 21. –23. februar skipar MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, fyri sjónleikaraskeiði í Suðuroy.

Skeiðið vendir sær til øll fólk yvir 16 ár, royndi sum óroynd, ið hava áhuga fyri at spæla sjónleik, at undirhalda, at lesa upp o.tíl.

Arbeitt verður við grundleggjandi sjónleikaravenjingum, dansi, improvisatión og tekstbrotum.

Tema á skeiðnum er: Í staðin fyri at kroppurin stendur í vegin – so vísir hann tær vegin.

T.v.s. at sleppa undan kensluni av, at kroppurin læsist, stívnar ella bara er ein forðing fyri at tú skalt kunna reisa teg upp og bera eitthvørt fram fyri eini fólkamongd – heldur arbeiða fram ímóti at brúka kroppin sum eitt amboð, eitt hjálpitól, ið kann stuðla undir og gera tað, sum tú vilt bera fram áhugavert at hyggja at.

Skeiðið verður hildið í Gistingarhúsinum við Á í Øravík.

9 skeiðstímar verða tilsamans.

Undirvísari verður Bárður Persson frá Leikarafelag Føroya, sum í fjør varð útskrivaður av sjónleikaraskúlanum í Århus.

Kostnaður fyri skeiðið er kr. 300, og tilmelding er hjá MáF, tlf. 315624, teldupostadressa maf@maf.fo

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hevur Fólkaflokkurin ongi moralsk mørk?

Fyrispurningar til Anfinn Kallsberg, løgmann og til tíðindaleiðararnar í almennu fjølmiðlunum.

Áki Andreasen

Tíbetur hugsi eg ikki, at nógv fólk lesa Dagblaðið. Men hetta er alment málgagn hjá Fólkaflokkinum og verður stýrt av formanninum í tingbólki Fólkafloksins. Sostatt er avsendarin av hesum, flokkurin hjá løgmanni, Anfinni Kallsberg.

Eg havi í nýggjari tíð ongantíð sæð slíka hatska skriving og útspilling av øðrum menniskjum. Tann boðskapur, sum gongur ígjøgnum skrivingina í Dagblaðnum, er so andstyggiligur, at tú øtast. Fólkaflokspolitikarar verða hálovaðir fyri arbeiði, sum teir ongan heiður hava av, meðan serliga samgongufelagin Tjóðveldisflokkurin, verður spiltur niður í sand og øsku.

Serliga Karsten Hansen, Høgni Hoydal, Heini O. Heinesen og Torbjørn Jacobsen hava verið so persónliga útspiltir í Dagblaðnum seinastu 5 árini, at tað hevði rúgvað upp í eina heila orðabók av ókvæmisorðum. Avgjaldsgrísur, stampatrampari, lygnari, hundur og beist, eru bert milum tey mildastu heiti, ið Fólkafloksins málgagn hevur sett á teir. Samanberingar við hópdrápsmenn og bølmenni hava somuleiðis verið gerandiskostur. Og heldur ikki eru familjurnar hjá tjóðveldspolitikarum slopnar undan útspillingini hjá Fólkaflokkinum.

Friðaður í klassa A
Andstyggiligheitirnar í skriving Fólkafloksins hava tó ongantíð elvt til politiskar gølur ella nakra kritiska viðgerð í Útvarpi ella Sjónvarpi. Hinvegin hava Fólkaflokkurin og almennu fjølmiðlarnir fleiri ferðir gjørt stórar gølur burturúr, tá onkur tjóðveldispolitikari hevur sagt okkurt minni hóskiligt um løgmann, sum tó ikki er nær námind so grovt, sum skriving Óla Breckmans.

Eg veit tildømis, at Sjónvarp Føroya eigur upptøkur av Óla Breckmann, tá hann í 1998 á Gamla Apoteki leyp fullkomiliga fram av og spilti Signar á Brúnni og Heina O. Heinesen út fyri opnum myndatóli við eiðum og ókvæmisorðum. Men SvF tordi ikki at senda hetta út.

Minni enn tvey ár seinni sendi SvF tó út eina bandupptøku hjá Sosialinum við Torbjørn Jacobsen. Hví verður hesin munur gjørdur?

Niðurstøðan kann bert vera, at Fólkaflokkurin hevur ongi moralsk mørk og ongin setur krøv um, at hann skal fylgja vanligum fólkaskikki. Hann kann siga hvat hann vil, uttan at nakar almennur fjølmiðil setur spurnartekin við tað. Og hann kann kalla øll onnur fyri hvat sum helst.

Men almennu fjølmiðlarnir gera gølu burturúr, um onkur sigur sína hugsan ov hart um fólkaflokspolitikarar.

Tað sær altso út til, at Fólkaflokkurin verður friðaður í klassa A, helst tí at fjølmiðlarnir sjálvir ræðast útspillingina frá fólkafloks-politikarum.

Geva øðrum skyldina fyri alt
Seinasta dømið um, hvussu grovt Fólkaflokkurin sleppur at týggja sær, er málið við Jørgen Niclasen. Ein landsstýrismaður er farin út um sínar heimildir, og ein drúgv kanning staðfestir hetta. Almennir pengar eru saneraðir ov nógv hjá privatum fyritøkum.

Fjølmiðlarnir gera nógv burturúr og reisa teir røttu spurningarnar. Fólkaflokkurin og Løgmaður bróta øll moralsk mørk í royndini at verja sínar egnu. Øll vita, at var ikki talan um ein fólkafloksmann, so hevði málið verðið avgreitt sama dag, sum kanningin kom.

Men Fólkaflokkurin og Løgmaður draga málið út og hava einsamallir ábyrgdina av, at Jørgen Niclasen verður settur frammanfyri tey rullandi sjónvarpstólini.

Undir viðgerðini spilla fólkafloksmenn Tjóðveldisflokkin út og eru teir einastu, ið ikki duga at fara virðiliga fram.

"Knívar í bakið", "Niðingsgerð" og "Jørgen hevur onki skeivt gjørt" verður rópt upp í saman, hóast alt er beinleiðis ósatt.

Hvussu kann tað vera ein knívur í ryggin frá Tjóðveldisflokkinum, at Jørgen Niclasen ikki hevur umsitið eftir lógini?

Tjóðveldisflokkurin skyldina av feilunum hjá fólkafloksmonnum?
Eftir útspillingina hjá Fólkaflokkinum av Tjóðveldisflokkinum og av almennu fjølmiðlunum, byrja almennu miðlarnir at hokna. Útvarpið sigur, at hørð orð og kegl flugu millum samgonguflokkarnar, og eigur Fólkaflokkurin nú ikki at siga samgonguna upp, spyrja teir.

Men hvør leyp á nakran uttan júst Fólkaflokkurin? Og hvussu kunnu mistøkini hjá einum fólkaflokslandsstýrismanni, knappliga geraast trupulleikin hjá Tjóðveldisflokkinum? Og hví spyrja almennu fjølmiðlarnir nú løgmann, um hetta kann elva til samgonguslit

Síðani koma Dagblaðið og fleiri lesarabrøv hjá fólkafloksmonnum, har teir framvegis royna at kasta skyldina fyri egin mistøk yvir á Tjóðveldisflokkin. Hann hevur annars gjørt alt eftir bókini í hesum máli og hevur ikki brúkt eitt ókvæmisorð ella lagt eftir nøkrum persóni.

Eg havi fingið nóg mikið av hesum og vil tí spyrja bæði løgmann og tíðindaleiðararnar í almennu fjølmiðlunum nakrar spurningar.

Fyrispurningar til Løgmann, Anfinn Kallsberg.
Tekur Løgmaður undir við teimum orðum, ið verða søgd um formann, tingfólk og landsstýrisfólk Tjóðveldisfloksins í Dagblaðnum og í øðrum almennum miðlum frá serliga Óla Breckmann?

Hvat hevði løgmaður gjørt, um formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins ella annar tinglimur alment hevði rópt Løgmann fyri svíkjara, knívstingara, judas, pilatus o.s.fr???

Hví sigur Løgmaður, at ein kanningarstjórafrágreiðing kann ikki brúkast tá hon sigur, at Fiskimálaráðið er farið út um heimildirnar í lógini. Men í somu viku sigur hann, at ein onnur kanningarstjórafrágreiðing kann brúkast, sum hevur fríkent Signar á Brúnni? Er munur á monnum ella á kanningarstjórum?

Hví valdi Løgmaður at útseta Jørgen Niclasen fyri almenna viðgerð í fleiri tímar, tá hann kundi sloppið undan tí?

Hvat hevur Tjóðveldisflokkurin gjørt skeivt í málinum við Jørgen Niclasen, og hvat av hesum er grundarlag fyri at landsins leiðari tosar um samgongutrupulleikar?

Fyrispurningar til tíðindaleiðararnar í Sjónvarpi Føroya og Útvarpi Føroya.
Høvdu tit mett tað sum tíðindir, at formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins kallaði løgmann ella ein annan tinglimur fyri svíkjara, knívstingara, judas, pilatus o.s.fr???

Hví eru tað ikki tíðindir, tá ein leiðari í Fólkaflokkinum stútt og støðugt persónliga spillir varaløgmann út, meðan eitt heilt summar gongur við at vídgera í tíðindunum, at ein tjóðveldismaður hevur sagt okkurt um løgmann?

Hví sendi SvF ikki upptøkuna við Óla Breckmann, har hann leypir framav, meðan SvF sendir bandupptøku við Torbjørn Jacobsen, sum verður útvegað frá Sosialinum?

Hví spyrja tíðindafólkini um samgongan er í vanda, tá ein fólkaflokksmaður hevur gjørt nakað skeivt, men ikki tá aðrir landsstýrismenn eru í trupulleikum?

Hví siga tíðindafólk í Útvarpinum, at beisk orð og kegl flugu millum samgonguflokkarnar í tinginum, tá bert fólkaflokksmenn vórðu óhóviskir?

Verða tíðindir viðgjørd út frá ymsum krøvum um moralsk mørk og fólkaskikk hjá ymsu politikarunum.

til fígginda mín

fíggindi mín,
eg skal fremja kærleika mín
á tær -
og royna góðskuna við.
verð ikki ov bilsin
av teimum tingum sum eg man gera.
eitt blítt orð í umbýti fyri eitthvørt
kvettorðað ting tú manst siga,
eitt óvæntað verk
eg skal gera fyri teg á vegnum.
møguliga tá skal koma tíðin
at eitt undur skal henda -
ístaðin fyri at vera fíggindi mín
tú skal blíva ein mín vinur!

chr.fróði

Dansur aftur í Badmintonhøllini

TÍÐINDASKRIV

Aftaná ein steðg í eina tíð, verður aftur dansur fyri ung undir 18 ár í høvuðsstaðnum.

Fyrireikararnir góvust í des. mánað í fjør, tí tað ikki loysti seg at hava dans í samband við at býráðið álegði loyvishavarunum í Badmintonhøllini at steingja dyrnar kl.02:00. Nú er so avgjørt at dansur og onnur tiltøk kunnu vera har aftur eftir gomlu skipanini, tvs. at dansurin kann halda áfram til kl. 3:30 eins og áður.

Leygarkvøldið 8.feb. verður DJ-SHOW, FREESTYLERS-KAPPING. Sum áður nevnt, endar tiltakið kl.03:30 Dyrnar latað upp kl.23:00. Framvyir verða tó ávísir broytingar, og millum annað verður tað aldursmark 14 ár fyri at sleppa inn. Harafturat skulu grannar fáa varskóð nær tiltøk eru og eyka fólk skal setast at ansa eftir uttanfyri og í samstarvi við Náttarravnarnir verður hetta gjørt, í eini roynd at fyribyrgja ófrið hjá grannum. Ein áheitan er tí foreldur um at minnast til at nevndu tiltøkini ikki eru fyri børn undir ásetta aldursmark. Nú kunnu ungdómar so aftur gleða seg til at sleppa í býin og í dans. Nógv koma vanliga eisini av bygd hendanvegin tá ið dansur er, tí koyra bussar aftur og fram til Badmintonhøllina frá Vestmanna, vágunum og Eysturoynni, og tað ber til at bíleggja sær pláss við at ringja á tlf. 22 33 11 ella 21 64 64.

1. mars verður stórt fastalávintstiltak har fleiri bólkar frá "Prix Føroyar" koma at spæla og undirhalda. Tað verður eisini burturluta ymiskir vinningar til flottastu grýlurnar.
29.mars verður so fyrsta innleiðandi kapping í "Ársins Songrødd 2003" fyri suðurstreymoy.
12.apríl verður konsert við kendum bólki.
10.mai verður annað umfar fyri suðurstreymoy í „Ársins Songrødd 2003"
24.mai er dj-show og Freestyler kapping
7.juni verður konsert
21.juni er konsert og dj-show